

gjøgnumgangstóni er so sjálvsagt — og tó er bara Bach, ið kann skriva so.

Her harmoniserar hann heilt eftir orðunum — m.a. tí hevur hann gjørt 11 ymiskar harmoniseringar til »Lít allar tínar leiðir« og neyvan kann tað verða sagt betur!

Ikki tí at »stemmuføringin« altíð er so løtt — her krevst sangvani og oyra. Henda partin haldi eg, kórið klaraði best.

Bach breyt upp úr nýggjum og var í mongum førum framman fyri sína tíð. Í koralunum er hann mangan romantikari.

Og so siga tey, at romantisk harmonisering er ókirkjulig! Her **undirstrika** tær romantisku harmoniseringarnar veruliga nakað. Tess nærri vit koma krossfestingini, tess romantiskari gerst hann — uttan at verða sukursøtur. Mangan ger hann slíkt, ið bara Bach kann loyva sær at gera. Spælir hann hund? Nei, als ikki — her er væl hugsað ígjøgnum. Hetta er gudaborið.

Besti kórtónleikur higartil

Men eitt er so tað, at Bach er geni. Tað vistu vit av frammanundan. Men tað skal so sanniliga eisini sítt til at framføra henda kompliseraða og gjøgnumarbeidda tónleikin, so at hann ljóðar, sum Bach hevði ætlað tað. Annars kann tað lætt bliva ein greytur.

At eitt amatørkór — og partvís amatørorkestur — skuldi klára tað so væl, sum tey gjørdu, hevði fáur trú. Dramatikkurin og »stemningurin« var framúrskarandi. So nógv tann besti kórtónleikur, sum verið hevur her á landi. Tað sæst, at tónleikarlívið stendur í fullum blóma — og skjótt gongur framá. Fyri 10 árum síðani hevði hetta verið science fiction.

Willi Gohl hevur enn einaferð víst seg sum ein meistarligan kórleiðara. Og tónleikararnir kunnu vera vælnøgdir. Tað besta staðið var Krossfestingin. Deyðakvirt í salinum, og ikki eitt eyga var turt.

Passiónin varð tikin upp bæði til útvarp og sjónvarp. Men hon skuldi hoyrast í Norðurlandahúsinum. Í upptøkunum missir hon altíð eitt sindur.

Bert eitt, ið spilti: Hammond-orgul hóskar ikki til klassiskan tónleik. Eitt pípuorgul í Norðurlandahúsinum hevði komið væl við.

Hetta er so tað, ið slíkur tónleikur er skrivaður til: gudstænastuna. Og so hoyra vit so mangan um henda tónleikin, hvussu illavorðið og blasfemiskt tað er at »hava konsertir« í kirkjuni! Í kirkjuni skal bara vera sálmasangur, og »Orðið má hava fyrstarætt«.

Orðið — ja, púra rætt. Men er nakar betri háttur at boða Orðið enn just passiónirnar hjá Bach?

Heri

Luttakarar í Johannes Passiónini

Leiðari Willi Gohl

SOLISTAR

Sopran	Sanna í Brekkunum
Sopran	Marit Mordal
Alt	Verena Barbara Gohl
Tenor (Evangelistur)	Michael Goldthorph
Bass (Jesus)	Stephen Kramp
Bass (Partur)	Hans Som

ORKESTUR

I violin	Sigurd Feirung
	Claire Lydon
	Monica Stauss Joensen
	Kári D. Petersen
	Poul J. Thomsen
	Atli Ellendersen
	Óssur Bæk
II violin	Kanny Sambleben
	Viggo Dal-Christiansen
	Sámal Petersen
	Jóanes Madsen
	Angelika Som
	Bettina Jucksch
Bratsch	Bogi Lützen
	Absalon Djurhuus
	Laila Nielsen
	Franciska Gohl
Cello	Petra Schmidt
	Fiona Clark
	Katharina Gohl
Kontrabass	Claus Nybroe
Floyta	Maria Cederborg
Obo	Kári Bæk
	Kim Seier Hansen
Klarinett	Martin Mouritsen
Orgul/Cembalo	Ingomar Rainer
Kontra Fagott	Werner Schulze
Fagott	Jógvan Zachariassen

KÓR

Sopran	Sonja Kristoffersen
	Anna Maria Oskarsson
	Berghild Poulsen
	Dinna Gilstón
	Jóna Larsen
	Elsuba Iversen
	Joanna Johansen
	Kathrina L. Joensen
	Katrin Guldbro
	Marit Mordal
	Marjun Bæk
	Ruth Rasmussen
	Brynhild Ludvig
	Sanna í Brekkunum
	Sólrun Patursson
	Ingun Simonsen
	Rúna á Heygun
Alt	Hjørdis Reinert
	Petra Iversen
	Ása Justinussen
	Annette S. Larsen
	Gunvør Poulsen
	Helena Hansen
	Oddvør Michelsen
	Birgit Remmel
	Hallgerð á Lofti
	Inga Hansen
	Johnny Dalsgarð
	Randi Hansen
	Tine Hammerlund
	Turid Madsen
Tenor	Árni av Reyni
	Hansen Iversen
	Pauli Hansen
	Jákup Lamhauge
	Dánial Pauli Haraldsen
	Jóannes Dalsgarð
	Tórður Mikkelsen
	Hans Erland í Brekkunum
Bass	Jóannes á Váli
	Ólavur á Váli
	Ólavur Hátún
	Ólavur Jøkladal
	Thorleif Hansen
	Heðin Johannesen
	Svenning Eysturdal
	Fróði Sandoy
Kór-innlæring	Ólavur Jøkladal